# Skeljavertíðin byrjar aftur

**– Árið í fjør royndist vánaligt. Veðrið var ólagaligt, og skeljarnar vóru ikki vaksnar, helst tí, at gróðurin í sjónum var so vánaligur, sigur Sofus Poulsen, stjóri**

SKELJAR
*Vilmund Jacobsen*


*Skeljabáturin, Norðheim, hevur verið til 4-ára klassing á Tórshavnar Skipasmiðju í summar. Seinastu dagarnar hevur skipið ligið í Runavík, har maskinverkstaðurin, FJM, hevur umvælt bond og annað. Klárt er nú at fara á skeljaveiði, sum byrjar síðst í hesum mánaðinum og endar síðst í februar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Oyri:** Vertíðin, tá ið roynt verður eftir jákupsskel eystanfyri, byrjar nú aftur. Veiðiloyvið er galdandi fram til endan av februar.

Skeljaveiðan, sum nú hevur meira enn 30 ár á baki, hevur verið rættiliga støðug í nógv ár; hon hevur ligið rundan um tey 4000 tonsini um árið. Men okkurt árið vignast veiðan verri enn miðal. Eitt av hesum árunum var seinasta ár, tá ið vertíðin ikki hildnaðist.

Sofus Poulsen, stjóri, sigur, at veðurlíkindini háttaður sær ikki væl síðsta heyst og síðsta vetur, og skeljarnar vóru ikki vaksnar, sum hann tekur til.

Spurdur, um vánaligi gróðurin í sjónum kann hava havt týdning fyri vøksturin, sigur hann, at tað ivast hann onga løtu í.

– Aftrat hesum kemur, at líkindini royndust illa. Norðheim, sum hevur dreggjað eftir skeljum síðan 1979, gevst at fiska, tá ið vindurin kemur uppí 15 m/sek. Lítið og einki kemur burtur úr at royna, tá ið ruskut er í sjónum, tí dreggið fer at »hoppa« eftir botninum.

Sofus vónar, at komandi vertíðin fer at roynast betur enn hin seinasta, nú gróðurin í sjónum er munandi betur enn í fjør.

### Klassaður

Norðheim hevur annars verið til 4-ára klassing á Tórshavnar Skipasmiðju í summar, og seinastu dagarnar hevur skipið ligið í Runavík, har maskinverkstaðurin, FJM, hevur umvælt bond og annað umborð. Skipið hevur eisini fingið satelit-skipan, sum nú er eitt krav.

Skeljabáturin er nú so gott sum klárur at fara til fiskiskap. Seks mans eru við Norðheim, og teir ganga 6 og 6, sum tað eitur.

Teir flestu hava verið við skipinum í fleiri ár og í tíðini, meðan skipið liggur, plaga skipari og maskinmeistari at vera knýttir at skipinum í samband við bedingsarbeiði og umvælingar annars.

Men hvat taka so hinir av manningini sær fyri, tá ið skipið liggur í tíðarskeiðinum frá mars til august?

– Í fyrsta lagi fær manningin vanliga eina hampiliga ársinntøku teir sjey mánaðirnar, ið fiskað verður. Meðan teir eru í landi, smíðar onkur, onkur rør út og onkur fæst við bóndaskap, sigur Sofus.

### 18 fólk á landi

Eini 18 fólk arbeiða á Skeljavirkinum á Oyri, tá ið vertíðin er. Gongst sum ætlað, landar Norðheim livandi skeljar einaferð um samdøgnið, og vanliga gevur ein túrur ein arbeiðsdag hjá hesum 18 fólkunum. Fellir tað nú soleiðis, at landað verður leygardag, verður eisini arbeitt á virkinum leygardag.

Øll framleiðslan hjá Skeljavirkinum verður seld til Fraklands.

Vit kunnu leggja aftrat, at fyrstu royndirnar, sum Poppy gjørdi at veiða skeljar undir Føroyum, vórðu gjørdar í 1969. Árið eftir – í 1970 – byrjaði so O.C. Joensen at virka skeljar á Oyri.

Felagið keypti Norðheim í 1979, tá ið skipið, sum tá var eitt ídnaðarskip við sama navni, var farið av knóranum.

Eitt av nøvnunum, Norðheim áður hevur havt, er Bjarnoy.

# Fellið í rækjuflotanum merkist á Oyri

**– Fyri tveimum árum síðan vóru 12 rækjuskip í flotanum; í dag eru bert 7 eftir, sum eru í vinnu. Hetta merkist týðiliga á Rækjuvirkinum, sum orsakað av tollviðurskiftum bara kann keypa føroyskar rárækjur, sigur Sofus Poulsen, stjóri**

RÆKJUR
*Vilmund Jacobsen*

**Oyri:** Á teimum báðum virkjunum á Oyri, Skeljavirkinum og Rækjuvirkinum, fara eini 100 fólk burtur av at starvast í vetur. Skeljabáturin, Norðheim, sum hevur ligið síðan endan av februar, fer nú útaftur fyrsta dagin, og í gjár var rækjutrolarin, Kappin á Oyri, við 420 tonsum av rækjum.

Á Rækjuvirkinum hava tey havt ein summarsteðg í tríggjar vikur, og í hesi vikuni byrjaðu tey aftur, nú Kappin kom undan Ný Foundlandi.

Sofus Poulsen, stjóri, sigur, at á báðum virkjunum fara eini 100 fólk tilsamans at arbeiða í vetur.

Á Rækjuvirkinum verður arbeitt við tveimum vaktum, og stjórin væntar, at hetta verður uttan steðg tað, ið eftir er av hesum árinum.

Spurdur, um virkið hevur nógvar rækjur niðurfyri, sigur hann, at tað hava tey ikki.

Hann ivast tó ikki í, at nóg mikið verður at gera teir næstu mánaðirnar.

– Í fjør vár løgdu vit stilt einar tveir mánaðir, tí vit høvdu ongar rækjur á goymslu. Árið fyri var einki til hindurs fyri at arbeiða alt árið, sigur Sofus.

### Tað merkist

Stjórin vísir á, at tað merkist týðiliga á virkinum á Oyri, at rækjuflotin er so nógv minkaður.

– Fyri tveimum árum síðan vóru 12 rækjuskip í flotanum; í dag eru bert 7 skip eftir, sum eru í vinnu.

Hann sigur, at tollviðurskiftini gera, at tað ikki lønar seg at keypa aðrar rækjur enn tær, sum føroysku skipini koma við.

– Skulu vit keypa rækjur úr øðrum londum, noyðast vit at rinda 20% í tolli, og tá hongur framleiðslan slett ikki saman.

Sofus sigur, at tað er tungt at reka Rækjuvirkið í løtuni við teimum marknaðarprísum, sum eru.

– Men vit vóna, at marknaðurin fer at batna sum frá líður.

### Alt fer til ES

Stjórin sigur, at tað gongur væl at fáa fólk til arbeiðis.

– Vit hava havt ein fastan »stab« av fólki í nógv ár, og síðan eru tað nøkur, sum koma og fara, sigur Sofus Poulsen at enda.

Tveir triðingar av rækjunum, sum Rækjuvirkið á Oyri virkar og selir, fara til Onglands. Restin fer eitt nú til Fraklands og Danmarkar. Øll framleiðslan fer til ES-lond.


*Tilsamans 100 fólk fara at arbeiða á Rækjuvirkinum og Skeljavirkinum á Oyri í vetur.*
*– Vit hava havt ein fastan "stab" av fólki í nógv ár, og síðan eru tað nøkur, sum koma og fara, sigur Sofus Poulsen, stjóri.*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



### Maskinmeistarar í 1973

Fyri 30 árum síðan fingu hesir 19 næmingar handað maskinmeistaraprógv á Føroya Sjómansskúla. Próvtøkurnar vóru í juli 1973.
Gunnleif Hilmarsson Danielsen, Tórshavn, Jóannes Páll Hansen, Tórshavn, Páll Johannes Hansen, Tórshavn, Hilmar Jacobsen, Tórshavn, Max Petersen, Tórshavn, Høgni av Reyni, Tórshavn, Poul Erik Fjallsbak, Klaksvík, Poul Kristian Henriksen, Klaksvík, Jóannes Johannesen, Klaksvík, Jákup Vørðá Poulsen, Klaksvík, Hans Jacob Danielsen, Saltnes, Joen Jacob á Fløtunum, Lamba, Kartsen Frederiksberg, Strendur, Hans Terji Hansen, Nes, Heini Høghamar, Eiði, Kristian Jacobsen, Glyvrar, Jógvan Jensen, Fámjin, Hans David Joensen, Norðragøtu, Páll Jóhan Mikkelsen, Vestmanna.
Lærarararnir á myndini eru: Tummas Andreasen, Hjørleif Hentze, Finnur Johansen og Magnus Simonsen.

*Kelda: Myndaárbókin, árið ið fór, 1973*

### Ragnar C. Joensen 20 ár í SVF

15. juli hevði Ragnar C. Joensen í Havn 20 ára starvsdag í SvF. Ragnar er havnarmaður, foreldrini vóru Helena, f. Isaksen, og Conrad Joensen í Havn. Hann er útbúgvin radiomekanikari og arbeiddi í mong ár á samskiftisdeildini hjá Telefonverki Føroya Løgtings.

15. juli 1983 bleiv hann settur í starv hjá Sjónvarpi Føroya, og var hann ein av teimum, sum varð settur at leggja lunnar undir stovnin og varð tekniskur leiðari í mong ár. Í dag er hann leiðari á samvirkisdeildini hjá SVF.

Ragnar er giftur við Svanhild, f. Christiansen, úr Havn. Børnini hjá teimum eru: Malan Kjærbo, sum býr í Tanzania, Tórun Andreasen, sum býr í Havn, Leivur Joensen, sum býr í Havn, og Bárður Christiansen, sum í løtuni er í Tanzania.



### Borgar Nybo deyður



Mikudagin 13. august andaðist Borgar í Andrasstovu Nybo í Havn 61 ára gamal. Borgar var føddur og uppvaksin í tí kenda rabarbukvarterinum í Havn. Hann var sonur Annu, f. Thomsen, úr Kollafirði og Hans Nybo, ættaður úr Hesti.

Borgar lærdi á goymsluni hjá Farodane í Havn frá 1956-60. Eftir tað koyrdi hann í Akstur Bil, samstundis sum hann røkti koyringina fyri specialskúlan saman við pápanum, Hans Nybo. Borgar og Hans vóru eisini partaeigarar í bilstøðini Auto frá 1978-94. Borgar koyrdi fyri Skúlan á Trøðni til fyri fáum árum síðan. Hann hevði stóran áhuga fyri kríatúrum og hevði bæði gæs og dunnur. Eisini var hann íðin javnaðarmaður alla sína tíð.

Borgar giftist við Ásfríð, f. Poulsen, úr Havn. Tey bygdu hús í Traðarbrekku í Havn og fingu tríggjar synir og eina dóttir.

### Dagurin

**20. august. Bernhard**, deyður í 1153. Abbati og kirkjulærari í Fraklandi. Kom upp í munka- og nunnuskipanina, ið róptu seg *cisterciensaraskipanin*. Har gjør-dist hann skjótt oddamaður, og fekk stóran týdning í kirkjupolitikki og kirkjulæru í 12 øld. Bygdi í 1115 kleystrið Clairvaux og varð síðani róptur Bernhard úr Clairvaux. Hann var vanur at taka til: *Ora et labora* (bið og arbeið). Navnið er germanskt og merkir *bjørn og harður.*